Íslendingar:

# Hugsa langt út um Ísland og

**- Eg haldi, at tað hevur verið ógvuliga áhugavert og upplyftandi fyri føroyskt vinnulív at hoyra og síggja, hvussu íslendingar hava gjørt fyri at náa so langt, sum teir hava nátt hesi seinnu árini, sigur Áki Johansen, sum er leiðari á útflutningsdeildini hjá Menningarstovuni**




ÁTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin fóru eini 65 fólk úr Føroyum til Íslands at vera við í einum átaki, sum Menningarstovan og Kaupthing skipaðu fyri í sambandi við, at londini bæði fyrr í heyst undirskrivaðu ein fríhandilssáttmála, sum rívur niður flestu garðar millum Føroyar og Ísland.

Áki Johansen, sum er leiðari á útflutningsdeildini hjá Menningarstovuni, sigur, at vinnulívsfólk úr flestu vinnum í Føroyum eru við í átakinum.

Fjølmenta ferðalagið úr Føroyum kemur heimaftur úr Íslandi við flogfarinum í dag.

Sosialurin hitti Áka Johansen í telefonini úr Íslandi í morgun.

**Marell og Køgan**

Mánadagin, tá ið komið varð yvir til Íslands, vitjaðu tey tvær stórar íslendskar fyritøkur, nevniliga Marell, sum framleiðir útbúnað til vinnuna, bæði matvøruvinnuna og fiskivinnuna annars.

Marell er kend fyritøka innan fiskiídnaðin og tey, sum hava vitjað á fiskivinnuframsýningum uttanlands, hava í fleiri ár sæð Marell verið við á hesum framsýningum.

Marell og Formula.fo hava samstarvað um ymiskar vinnuligar loysnir.

- Men Marell er meira enn ein framleiðari av útbúnaði til fiskiídnaðin, sigur Áki Johansen.

Hann vísir á, at felagið, sum er vaksið nógv seinastu árini, eisini framleiðir útbúnað til høsnarungamarknaðin og til kjøtmarknaðin annars, og soleiðis hevur fyritøkan, sum eisini hevur stórt virksemi uttanfyri Ísland, trý bein at standa á.

- Meginparturin av framleiðsluni verður útflutt til onnur lond, sigur hann.

Áki veit at siga, at Marell nýliga hevur bygt nýggj og stór høli til virksemið í Íslandi, men longu nú eru nýggju hølini vorðin og trong, og neyðugt er við nýggjum útbygginum.

Mánadagin vitjaði føroyska ferðalagið eisini áhugaverdu fyritøkuna, Køgun, sum eitt nú virkar innan KT-vinnuna og eisini hevur deild uttanfyri Ísland.

Sum skilst, spennir virksemið hjá Køgum rættiliga víða við ymiskum fyritøkum undir sama hatti.

**Fyrilestrar**

Áki sigur, at týsdagurin fór allur til fyrilestrar, sum Kaupthing skipaði fyri um íslendskan búskap og íslendska vinnu í breiðum høpi.

Eftir at stjórin hevði boðið føroyska ferðalagnum vælkomnum, vóru fleiri framløgur, har ein av stjórunum eitt nú greiddi frá um íslendska búskapin – um hesin er eitt undur ella ein hvørvisjón.

Fyrilestar vóru eisini um íslendska íløgustrukturin, íløgumarknaðin, íløgubankavirksemi, um íløgur í byggivinnuni, handilsvinnuni og kunnungar-og samskiftisvinnuni.

Áki sigur, at tveir føroyingar, sum hava stórt virk-



*Føroyskir fjølmiðlar eru saman við føroyskum vinnulívsfólki í Íslandi*